


## Byggja nýggj strandfaraskip

Í Grønlandi hevur reiðaríið Royal Arctic Line gjørt av at skifta fleiri av teimum smáu strandfaraskipunum út. Felagið sigur, at fleiri av skipunum, sum sigla til tær smáu bygdirnar, eru gomul, og tí fer felagið at keypa nýggj skip tey bæði næstu árini. Nýggju skipini skulu taka 12 ferðafólk og nakað av farmi. Sum skilst er ætlanin at byggja tey nýggju førini á ymsum skipasmiðjum, og roknað verður við, at tey fyrstu fimm verða liðug í 2011. Byggiætlanin er tó treytað av, at landsstýrið gevur sína tilsøgn, sigur KNR.

# Skipaeftirlitið á ófráboðaða eftirlitsvitjan

**Føroya Skipara-og Navigatørfelag heitir á sínar limir um at gera trygdarvenjingar umborð á fiskiskipum og at kunna mynstraðar fiskimenn um trygdina**

TRYGD
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri var framløgufundur í Miðlahúsinum í Vágsbotni av úrslitunum í kanningini um viðurskiftini umborð á fiskiskipum, sum Skipaeftirlitið og Føroya Fiskimannafelag hava gjørt í felag.

Tilsamans 1200 spurnarbløð vórðu send út, og av hesum komu 226 svar aftur.

Til framløguna í Miðlahúsinum vóru eini 30 fólk møtt. Hetta vóru serliga fólk, sum starvast við trygdarspurningum í skipaflotanum.

Semja varð um, at okkurt munagott má gerast við trygdarvenjingarnar umborð og kunningina til fiskimenn, sum eru við fyrsta túrin.

### Trygdarvenjingar

- Støðan er bøtt munandi, síðan allir fiskimenn hava fingið trygdarskeið, tó eigur okkurt, at verða gjørt við hugburðin og kunnleikan hjá skipsyvirmonnunum.

Hetta er niðurstøðan, sum felagið hjá navigatørum, Føroya Skipara-og Navigatørfelag, kemur til eftir framløgufundin í Miðlahúsinum.

Á síni heimasíðu vísir felagið, sum eisini hevði umboð við á framløgufundinum, á, at ISM-skipanin, sum verður brúkt við handilsskipum, saktans kann tillagast til fiskiskipaflotan eisini.

- Tað eru serliga trý viðurskifti, sum fiskimenn ikki eru heilt nøgdir við. Hesi eru vantandi venjingar, ov lítil kunning frá yvirmonnunum um trygdarútbúna og trygdarfyriskipanir eins og atkomuviðurskiftini til skipið.

Føroya Skipara-og Navigatørfelag vísir á, at sambært kanningini eru fiskimenn væl nøgdir við eitt nú hvíldartíð, arbeiðsamboð, eins og eingir málsligir tupulleikar eru staðfestir í kanningini.

- Nøgdsemi er sum heild betri umborð á nótaskipum og flakatrolarum enn umborð á línuskipum og ísfiskatrolarum. Staðfest er soleiðis, at støðan helst er frægari við teimum nýggjaru skipunum, og har manningin er meira støðug, vísir felagið á.

### Ófráboðað vitjan

Á framløgufundinum boðaði stjórin í Skipaeftirlitinum, Vilhjálmur Gregoriussen, frá, at eftirlitið seinni í ár fer á ófráboðaðar vitjanir umborð á skipum.

Á heimasíðuni hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag heitir felagið á sínar limir um at gera trygdarvenjingar og at kunna mynstraðar fiskimenn um trygdina umborð.

Felagið heitir samstundis á sínar limir um at minnast til at dokumentera gjørdar trygdarvenjingar og kunning í tilsýnsbókina og dagbókina umborð.



*Kanningin, sum Skipaeftirlitið og Føroya Fiskimannafelag í felag hava gjørt um støðuna umborð á føroyskum fiskiskipum, vísir, at fiskimenn ikki eru nøgdir við trygdina umborð*
*Mynd: Rógvi K. Mouritsen*

# Landaðu fýra ísfiskatrolarar leygardagin




*Polarhav, Stjørnan, Bakur og Stelkur landaðu í Saltangará leygardagin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er vorðið meira og meira vanligt, at skip landa í Saltangará leygardag, og soleiðis var eisini seinasta leygardag, tá ikki færri enn fýra ísfiskatrolarar landaðu á landingarmiðstøðini hjá Beta.

Leirvíkstrolararnir, Polarhav og Stjørnan, vóru inni við umleið 430.000 pundum, og Bakur og Stelkur hjá Faroe Seafood vóru inni við umleið 360.000 pundum.

Fyrr í vikuni løgdu eisini aðrir ísfiskatrolarar veiðina upp í Saltangará.

Rókur og Lerkur vóru inni síðsta fríggjadag við sløkum 400.000 pundum, og Heykur og Falkur høvdu 480.000 pund síðsta mikudag.

Tveir aðrir ísfiskatrolarar landaðu eisini í Saltangará í síðstu viku. Tað vóru Jaspis og Ametyst, sum høvdu 230.000 pund fyri umleið eini viku síðan.

Á landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará vænta tey í øllum førum fýra ísfiskatrolararnar til landingar hesa vikuna.

- Vit vænta, at Jaspis og Ametyst, ið vóru teir fyrstu, sum vóru inni í síðstu viku, koma inn at landa miðskeiðis í hesi vikuni, og síðan vænta vit Heyk og Falk seinnapartin í vikuni.

Á landingarmiðstøðini siga tey, at upsafiskiskapurin hevur verið sera góður í vár.

- Nú fer gýtingin hjá upsanum at vera av, og fiskur fer helst ikki at standa líka tættur sum áður. Tí kunnu vit eisini vænta, at tað verður eitt sindur longri ímillum tey góðu hálini hjá skipunum, sigur tey hjá Beta í Saltangará.